# Hans Pauli Strøm dregur revolvaran

**Hóast játtanin til Landssjúkrahúsið er alt ov lítil, fer hann beinleiðis at nokta leiðsluni á Landssjúkrahúsinum at seta neyðugu sparingar í verk**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Kemur tað til skarpskeringar, fari eg at nokta leiðsluni á Landssjúkrahúsinum at seta sparingar í verk.

Tað staðfestir Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum.

Sostatt er lagt upp til kríggj í samgonguni um okkara meginsjúkrahús, tí gongur sum restin av samgonguni ætlar, fær Landssjúkrahúsið alt ov lítið av peningi at arbeiða fyri í ár, eins og Allan Skaalum, sjúkrahússtjóri, greiðir frá í greinini niðanfyri.

Hans Pauli Strøm sigur, at hann royndi av øllum alvi at fáa samgonguna at seta meiri pening av til Landssjúkrahúsið, men tað miseydnaðist.

Tí hevur hann góðtikið játtanina, sum nú stendur á fíggjarlógini, sum varð lagt fyri løgtingið fyrr í vikuni.

Men tað var ikki treytaleyst, at hann góðtók tað.

### Gevur samgonguni kravboð

- Hetta var ein neyðsemja sum eg góðtók við teirri treyt, at hvussu víkir og vendir, skal virksemið hjá Landssjúkrahúsinum skal ikki skerjast.

Hans Pauli Strøm sigur, at hann kann rætt og slætt ikki liva við, at landssjúkrahúsið noyðist undir umfatandi sparingar, soleiðis sum leiðslan hevur boðað frá, verður avleiðingin av teirri játtan, sum samgongan hevur sett av á fíggjarlógini.

Verður tað sostatt neyðugt við hægri játtan fyri at varðveita virksemið, skal Landssjúkrahúsið hava hægri játtan.

Tá í fíggjarlógin er endaliga avgreidd úr Løgtinginum, fer hann sostatt at geva leiðsluni á Landssjúkrahúsinum beinleiðis forboð ímóti at seta sparingar í verk, sum raka virksemið, sum er á Landssjúkrahúsinum.

- Tað skal ongin funktión, sum er neyðug fyri tað virksemi, sum er, skerast burtur og tað skal ongin deild stongjast. Tað fær leiðslan á Landssjúkrahúsinum forboð fyri frá mær, staðfestir hann púra greitt.

Hann sigur, at hevur hann gjørt landsstýrinum púra greitt.

Hann sigur, at tað hevur mangan verður nevnt, at skal tað muna við sparingum, verður neyðugt, at niðurleggja heila funktiónir og í hesum sambandi hevur dialýsuviðgerð av nýrasjúklingum onkuntíð verið nevnt.

- Men Landssjúkrahúsið sleppur hvørki at niðurleggja dialýsuviðgerðina ella virksemið í sambandi við krabbamein, diabetis ella annað neyðugt virksemið.

- Tað einasta, vit fáa burtur úr tí er, at játtanin til serviðgerð uttanlands má hækkast og tí er skilaleyst við slíkum sparingum.

- Eg góðtaki heldur ikki, at deildir verða stongdar, tí tað fer at føra til longri bíðilistar og at skaðar verða verri og í longdini verður tað dýrari fyri allar partar.

Hann sigur, at nú skal ein óheft fíggjarlig kanning gerast av virkseminum á Landssjúkrahúsinum og verður niðurstøðan, at tað ikki ber til at varðveita virksemið, sum nú er á Landssjúkrahúsinum, við teirri játtan, sum er, skal játtanin hækkast.

Annars hevur hann givið leiðsluni á Landssjúkrahúsinum boð um at ansa eftir, at útreiðsluhækkingum, men tað skal ikki raka tað virksemi, sum er og sostatt skulu ongar týdningarmiklar funktiónir niðurleggjast.

- Sostatt skal tað virksemi, sum nú er á Landssjúkrahúsinum ikki skerjast, endurtekur hann.



*Hans Pauli Strøm bjóðar samgonguni av í kríggj. Er játtanin til Landssjúkrahúsið ov lítið, skal hon hækkast, hvussu so víkir og vendir, tí hann fer rætt og slætt at geva leiðsluni á Landssjúkrahúsinum forboð ímóti at spara*

---

# Landssjúkrahúsið skerast inn á bein

**Fær samgongan sín vilja, má Landsjúkrahúsið seta umfatandi sparingar í verk og tað verður bæði neyðugt at spara lønir og at niðurleggja tænastur, sigur Allan Skaalum, sjúkrahússtjóri**

HEILSUVERKIÐ

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Fær Landsjúkrahúsið ikki hægri játtan enn tað, sum samgongan hevur sett av á fíggjarlógini, fer tað at fáa álvarsligar avleiðingar.

Tað staðfestir Allan Skaalum, stjóri á Landssjúkrahúsinum.

Í fjør brúkti Landssjúkrahúsið 342 milliónir krónur og á fíggjarlógini í ár ætlar samgongan at seta 344 milliónir av til Landssjúkrahúsið.

Tað er ein hækking upp á tvær milliónir, ella ein hækking upp á 0,5%.

Samstundis eru útreiðslurnar munandi hækkaðar, bæði lønir og heilivágur.

- Tað er púra greitt, at játtanin í ár fer langt frá at rokka til tað virksemi, vit hava í dag, sigur stjórin.

### Samgongan krevur skerjingar

Hann sigur, at Landssjúkrahúsið hevur væl og virðiliga greitt frá, hví tað er neyðugt at hækka játtanina, men tað hevur samgongan so ikki tikið til eftirtektar.

- Svarið frá samgonguni er ein játtan, sum stendur í stað og tað kann ikki merkja annað enn tað, at samgongan krevur av okkum, at vit niðurlaga virksemið á Landssjúkrahúsinum fyri at fáa játtanina at røkka til.

- Øðrvísi kunnu vit ikki skilja boðskapin frá samgonguni og tað fara vit sostatt undir at fyrireika okkum til nú, leggur hann afturat.

Hann veit ikki, hvussu stórar sparingar, tað er neyðugt at seta í verk, tí tað hava tey ikki havt stundir til at rokna út, men fyribils metir hann, at tað verður neyðugt at spara minst 10 milliónir í rakstrinum.

Í hesum sambandi staðfestir hann, at tað verður neyðugt at spara lønir, men um tað verður neyðugt at siga fólki upp, veit hann ikki.

Hann heldur, at tað kanska fer at bera til at skipa vaktir øðrvísi, uttan at hann tó hevur gjørt sær fær um tað.

- Verður hetta endaliga úrslitið, verður í øllum førum ikki pláss fyri øllum teimum lønarútreiðslunum vit hava nú.

Annars verður tað sjálvandi eisini neyðugt at gjøgnumganga allan raksturin fyri at vita um tað ber til at spara onkustaðni.

### Tænastur niðurleggjast

Men tað er eisini greitt fyri Allan Skaalum, at sama, hvat tey gera, fer tað undir ongum umstøðum at bera til at halda fram við øllum tí virksemi, sum er á Landssjúkrahúsinum í dag.

- Tað er ongin ivi um, at vit kunnu ikki halda fram við øllum teimum tænastum, vit hava í dag og tí verður tað neyðugt at skerja heilar funktiónir burtur, staðfestir hann.

Hvørjar funktiónir, talan kann vera um, dugir hann ikki at siga enn, tí tað er ein spurningur, sum má takast upp við tær ymsu depilsleiðslurnar og tað skal eisini gerast í samráð við Almanna- og heilsumálaráðið.

- Men tað er í øllum førum greitt, at verður hetta endaliga játtanin, verður tað neyðugt at skerja ymsar funktiónir burtur.

### Fyri deyvum oyrum

Allan Skaalum sigur, at tey hava roynt at grundgivið fyri, hví Landssjúkrahúsið hevur tørv á eini størri játtan.

- Vit hava í fleiri ár grundgivið bæði væl og virðiliga fyri, hví játtanin til Landssjúkrahúsið er ov lítil.

- Men úrslitið, sum nú fyriliggur, er ein greið ábending frá samgonguni um, at tað kjakið er av á hesum sinni og so hava vit onki at gera uttan at halda okkum til tað og so er tað væl meiningin, at vit skulu halda upp at gera ymiskt av tí, sum vit gera í dag.

- Øðrvísi kunnu boðini ikki skiljast, leggur hann afturat.

Allan Skaalum staðfestir eisini, at játtanin er eitt vónbrot.

- Sjálvandi veit eg, at tað er tørført at fáa alt at ganga upp, men tað er týðiligt, at hetta følist sum at ganga í mótbrekku, leggur hann afturat.